# Brixtofte tvey ár í geglið

**Fyrrverandi borgarstjórin í Farum, Peter Brixtofte, hevur ikki fleiri møguleikar at kæra dómin um tvey ára treytaleysa fongulsrevsing, sum nú er staðfestur í Hægstarætti**

**DÓMUR**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Saman við Anders Fogh Rasmussen kappaðist Peter Brixtofte einaferð um formanspostin í Vinstra, sum fyrrnevndi fór avstað við, tá Uffe Ellemann Jensen legði frá sær í 1998. Brixtofte, sum einaferð var skattamálaráðharri í donsku stjórnini, er limur í býráðnum í Furesø kommunu. Eftir dómin í dag verður mett, at valnevndin í kommunini fer at koyra Brixtofte úr býráðnum, og harvið missir hann sín seinasta politiska post*

Hann, sum einaferð var býkongur í Farum, ið var roknað sum mynsturkommuna við lágum skattaprosenti og øðrum fyrimunum hjá borgarunum, sær nú fram til tvey ár handan rimarnar.

Í dag er endaliga staðfest, at Peter Brixtofte, skal inn at sita fyri undandrátt í kommununi, hann einaferð var borgastjóri fyri.

Hægstirættur, sum í dag hevur staðfest dómin í Landsrættinum og býrættinum í Hillerød, afturvísir påstandir um prosedurefeilir í rættargongdini. Samstundis sigur Hægstirættur, at talan er um upphæddir fyri níggju milliónir krónur og kallar tað fyri »skærpende omstændighed«.

- Hetta var ikki tað, vit høvdu væntað og vónað. Eg eri skakaður, men vil ikki siga meiri, fyrr enn eg havi tosað við Brixtofte, sigur verjin hjá politikaranum, Preben König, við Ekstrablaðið.

Við dóminum í Hægstarætti er niðurtúrurrin hjá 59 ára gamla Brixtofte ikki av enn, tí fyrrverandi borgarstjórin skal enn ein túr ígjøgnum rættarskipanina í sjálvari høvuðssakini, ið snýr seg um valdsmisnýtslu, embætismisnýtslu, mandatsvik og ovurnýtslu í tíð hansara sum borgarstjóri. Hesin dómurin er kærdur til Eystara landsrætt, ið byrjar viðgerðina í oktober.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morginn og hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, stundum upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. millum Íslands og Føroya fer spakuliga í landsynning.



**Í dag:**
Hátrýstið yvir Hetlandi stendur mestsum í stað og gevur góðveður á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$.
Avfallið higartil í apríl: 96 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 7.apríl | Mánin næstur jørðini |
| 12.apríl | Fyrra kvarter |
| 20.apríl | Fullmáni |
| 23.apríl | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15.apríl | 4:02 | 16:23 | 3:02 | 15:23 | 3:17 | 15:38 | 6:02 | 18:23 | 7:02 | 19:23 | 2:17 | 14:38 | 1:17 | 13:38 | 4:17 | 16:38 | 5:17 | 17:38 | 3:47 | 16:08 | 5:02 | 17:23 |
| 16.apríl | 4:45 | 17:05 | 3:45 | 16:05 | 4:00 | 16:20 | 6:45 | 19:05 | 7:45 | 20:05 | 3:00 | 15:20 | 2:00 | 14:20 | 5:00 | 17:20 | 6:00 | 18:20 | 4:30 | 16:50 | 5:45 | 18:05 |
| 17.apríl | 5:25 | 17:44 | 4:25 | 16:44 | 4:40 | 16:59 | 7:25 | 19:44 | 8:25 | 20:44 | 3:40 | 15:59 | 2:40 | 14:59 | 5:40 | 17:59 | 6:40 | 18:59 | 5:10 | 17:29 | 6:25 | 18:44 |
| 18.apríl | 6:04 | 18:23 | 5:04 | 17:23 | 5:19 | 17:38 | 8:04 | 20:23 | 9:04 | 21:23 | 4:19 | 16:38 | 3:19 | 15:38 | 6:19 | 18:38 | 7:19 | 19:38 | 5:49 | 18:08 | 7:04 | 19:23 |
| 19.apríl | 6:4119:015:41 | | 18:01 | 5:56 | 18:16 | 8:41 | 21:01 | 9:41 | 22:01 | 4:56 | 17:16 | 3:56 | 16:16 | 6:56 | 19:16 | 7:56 | 20:16 | 6:26 | 18:46 | 7:41 | 20:01 | |

Alt um harmonikur



www.simme.eu